# Bilar

Nr. 108 • hósdagur • 10. juni 2004 • 78. árg.

Kia Picanto 1,1 EX:

## Kia rakt plett við Picanto

**Picanto er tann fyrsti lítli bilurin frá suðurkoreansku bilverksmiðjuni, Kia Motors. Picanto er ein hatchback við fimm hurðum við góðum koyrieginleikum og ein tann best ljóðdoyvdi í sínum klassa**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Kia Picanto 1,1 EX. Evropeiskir motorjournalistar eru samdir um at Kia hava rakt plett við nýggja Picanto.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kia eru nú av álvara við í kappingini um minibilarnar. Við Picanto hava teir góð kort á hondum, tí bilurin er eitt sera gott tilboð í sínum klassa. Ætlanin hjá Kia Motors er at selja 80.000 Picanto í Evropa í ár.

Evropeiskir motorjournalistar eru samdir um at Kia hava rakt plett við Picanto. Fyrsta vikuskiftið bilurin bleiv sýndur fram í Danmark, vóru 11.000 vitjandi og yvir 1200 Picanto blivu seldir. Við rósandi orðum sum t.d. hvussu bíligur, praktiskur, og økonomiskur bilurin er, hava danskir og evropeiskir motorjournalistar gjørt sítt til góðu søluna.

Picanto er ein hatchback við 5 hurðum, ið einans er 3,5 m langur, men gott pláss er til fýra vaksin ella eina familju við trimum børnum. Í mun til støddina er talan um ein bil, har nógv pláss er fingið burturúr, og bilurin merkist ikki sum ein lítil bilur at koyra.

### Koyrir 20,4 km/l

Picanto fæst við tveimum ymiskum bensinmotorum: 1,0 litur við 62 hk og 1,1 litur við 65 hk, ið koyrir 20.4 km/l. Næsta ár kemur ein 1,1 litur turbodiesel við beinleiðis commonrail innspræning.

Bilurin er upprunaliga gjørdur til evropeiska marknaðin, og hann er góður og lættur at koyra. Eisini er Picanto tann best ljóðdoyvdi í sínum klassa.




*Picanto er ein hatchback við 5 hurðum, gott pláss er til fýra vaksin ella eina familju við trimum børnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Partar av intrekkinum, setur og hurðabetrekk, eru í sama liti, sum bilurin er lakkeraður í. Hetta gevur bilinum ein frískan og smartan dám.

Sum standard er Picanto 1,1 EX útgjørdur við t.d. tokulyktum í kúfangar-anum framman, leður ratt sum kann stillast í hædd, leður girknøtt, fjarstýrt sentrallás við alarmi, 4 hátalarar, el-síðurútar framman og aftan, radio við fløguspælara, airbag framman og í síðunum, tvídeilt baksetur, skivubremsur framman og aftan, og ABS bremsur við elektroniskum bremsudeilara (EBD). Kúfangarar, kølaragittarið, síðuspoylari og takspoylari eru lakkeraði í sama liti sum bilurin.

Bilurin hevur 3 ára óavmarkað kilometurgaranti fyri privatbilar umframt 6 ára rustgaranti. Sambært FDM hevur Kia besta verksmiðjugaranti yvirhøvur.

Picanto 1,1 EX kostar 126.800 krónur og í 1,0 LX kostar hann 116.800 krónur.



*Partar av intrekkinum, setur og hurðabetrekk, eru í sama liti, sum bilurin er lakkeraður í. Hetta gevur bilinum ein frískan og smartan dám.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Kia Picanto 1,1 EX

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,1 litur 4 syl. bensin 65 hk |
| 0-100 km/t | 15,1 sek |
| Bensinnýtsla | 20,4 km/l |
| Dekkstødd | 165/60-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 249,5 cm |
| Breidd | 159,5 cm |
| Hædd | 148,0 cm |
| Eginvekt | 875 kg |
| Viðførisrúm | 157 litrar |
| Prísur | kr. 126.800,- (metallakk + kr. 3.000,-) |
| Søluumboð | P/F D.B. Bilar<br>J. Broncksgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 310.600 |






*Sum nakað heilt nýtt í Føroyum ber nú til at keypa sær brúksrætt til eina nýggja Harley Davidson motorsúkklu í eitt tíðarskeið. Her er Óla Jákup Rólantsson frá Viku Blaðnum inni hjá Harley umboðnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Harley Davidson:

## Fullfør dreymin um eina Harley



*Súkklan er ein væl útgjørd Harley Davidson "Softail Standard" við 1449 ccm innspræningsmotori og tí heilt rætta Harley ljóðinum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



**Sum nakað heilt nýtt í Føroyum ber nú til at keypa sær brúksrætt til eina Harley Davidson motorsúkklu í eitt tíðarskeið. Talan er um eitt tilboð frá HD.fo - Harley Davidson í Føroyum**

MOTORSÚKKLUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Harley Davidson í Føroyum bjóða nú privatfólki og fyritøkum eitt sokallað "Time-Share" tilboð, har til ber at keypa sær brúksrætt til eina nýggja Harley Davidson "Softail Standard", árgang 2004, í t.d. 3 vikur í eitt tíðarskeið yvir 12 mánaðir. Tað vil siga at tú keypir tær brúksrætt yvir motorsúkkluni í 3 vikur, og gert so sjálvur av nær tú ynskir at brúka hana.

Endamálið við hesum tilboði er, at tú sleppur undan eini stórari íløgu í tína dreyma-motorsúkklu.

Við í leiguni er HD-útgerð til tveir persónar, so sum hjálmar, touringjakkar, buksur og handskar, eisini viðlíkagald og trygging er goldið. Prísurin fyri 3 vikur er 15.000 krónur + mvg.

Súkklan er ein væl útgjørd Harley Davidson "Softail Standard" við 1449 ccm innspræningsmotori og tí heilt rætta Harley ljóðinum.

Ove Ritter, frá Harley Davidson í Føroyum, sigur, at hetta skuldi nøkta tørvin hjá teimum flestu, sum koyra motorsúkklu. Tilboðið er galdandi fyri bæði privatpersónar og fyritøkur, ið kunnu brúka súkklurnar sum reklamu ella til presentatión.

Harley Davidson í Føroyum hava eisini fleiri onnur tilboð um leigu av motorsúkklum. Treytirnar fyri at leiga ein Harley er, at persónurin hevur MC-koyrikort, at hann er yvir 20 ár og hevur koyrt motorsúkklu í minsta lagi eitt ár.

Verkstaður og handil hjá Harley Davidson í Føroyum er í J. Broncksgøtu 33 í Havn. Opið er gerandisdagar frá kl. 16.30-18.00, leygardag og sunnudag frá kl. 10.00-13.00. Annars eftir avtalu, telefonnummarið er: 210405. Fleiri upplýsingar eru á heimasíðuni: www.HD.fo

### Prius nógvar heiðurslønir



Toyota Prius við sínum framkomna el-og bensinmotori hevur vunnið nógvar ymiskar heiðurslønir, sum t.d. International Engine of the Year 2004, Best New Engine, Best Fuel Economy, og Best Engine 1.4-litre to 1,8 litre. Eingin annar bilmotorur hevur fingið so nógvar heiðurslønir

*Kelda: Toyota Danmark*

### BMW í Kina



BMW leiðslan var herfyri í Shenyang í Kina í sambandi við at teir lótu upp eina nýggja bilverksmiðju har. Samstarvsfelagin, Brilliance China Automotive Holding Ltd. og BMW, eiga hvør sína helvt í hesi verksmiðju, ið kemur at framleiða 30.000 bilar árliga

*Kelda: Motor Magasinet*

### Lada framgongd



Fallið hjá Sovjetsamveldinum síðst í 80-unum gekk hart út yvir russisku Lada verksmiðjuna, AvtoVaz, sum so gott sum steðgaði upp. Nú gongur betur. Fyrsta ársfjórðing 2004 vaks framleiðslan við 27 prosentum í mun til í fjør

*Kelda: Lada Danmark A/S*